## Krevja endurgjald

Tey, sum eiga lendið kring aluminiumsverkið í Straumsvík í Íslandi, hava nú stevnt íslendska ríkinum, aluminiumsvirkinum Alcoa og kommununi í Hafnarfirði, har virkið er. Jarðareigararnir vilja hava tey stevndu at viðurkenna, at jørðin rundan um virkið hevur mist munandi virði orsakað av dálking bæði á sjálvum lendinum og í luftini. Tey, sum eiga jørðina, hava kravt, at virksemið í Straumsvík verður steðgað, men tað hendir neyvan.

## Reiðarí ringt ár

Hóast tað hevur ljóðað, at tað hevur gingið sera væl hjá teimum stóru donsku farmaskipareiðaríunum, royndist árið í fjør illa hjá reiðarínum Norden. Roknskapurin fyri 2006, sum júst er almannakunngjørdur, vísir, at avlopið hjá felagnum minkaði úr tveimum mia. krónum í 2005 til eina lítla mia. krónur í fjør. Roknskapurin vísir eisini, at inntøkurnar frá at allari siglingini minkaðu. Í ár væntar Norden at fáa 2,2 mia. krónur í avlopi.

# Tvíkiljurnar hjá KJ gerast

**Alivinna í Føroyum er aftur farin at gera íløgur. Hetta merkir, at positiv gongd aftur er í vinnuni, sum var á gravarbakkanum bert nøkur fá ár herfyri. At vinnan aftur hevur fótað sær, merkir eisini, at veitarar til alivinnuna hava meira at gera og millum teir, sum hava merkt framgongdina í alivinnuni, er KJ-**

### Hydraulik á Kambsdali

ALIBÁTAR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er ikki langt síðan, at KJ-Hydraulik læt ein nýbygning til Pan Fish í Oyndarfirði – ein alibát av slagnum, Hydro-Cat, ið nú er vørumerkið hjá hesum bátum.

Skrokkarnir eru smíðaðir í Letlandi, og síðan hevur KJ gjørt bátarnar lidnar í leigaðum hølum hjá Skarðhamri á Borðoyarvík.

Tað er KJ, sum eigur alt konseptið upp á alibátarnar, ið eru designaðir og teknaðir á Kambsdali.

### Fleiri sáttmálar

Alivinnan hevur tikið væl ímóti hesum bátum og hevur nú bílagt fleirwi bátar.

Tvíkiljan, sum KJ hevur latið Pan Fish í Føroyum, er soleiðis hin fyrsta av trimum í hesum umfari.

- Skrokkur nr. 19 er liðugur, og báturin kemur heim til Føroya í næstum. Um stutta tíð verður eisini farið undir skrokkin til nýbygning nr. 20. Tað er Luna í Gøtu, sum skal hava hesar báðar bátarnar, sigur Sofus Gregersen, marknaðarleiðari hjá KJ.

Fyrri skrokkurin hjá Luna var longu komin til Føroya, tá tvíkiljan hjá Pan Fish varð flotað á Borðoyarvík, og næsti skrokkurin hjá gøtumonnum fer væntandi úr Letlandi í komandi viku.

- Vit fáa skrokkarnar heim við Skipafelag Føroya, og tað tekur einar 2-3 mánaðir at gera teir lidnar á Skarðhamri.

Nú hevur KJ-Hydraulik so gjørt sáttmála um enn ein Hydro-Cat, sum verður nýbygningur nr. 21.

- Tað er Funnings Laks, sum skal hava hesa tvíkiljuna, og soleiðis verður talan um tilsamans fýra bátar í hesum umfari, sigur marknaðarleiðarin.

Hann vísir á, at tekningarnar til hesar seinnu bátarnar eru á leið tær somu, sum felagið áður hevur bygt, men teir nýggju verða nakað longri. Breiddin verður hin sama.



*Føroysku alibátarnir, sum Hydro Tech upprunaliga smíðaði, vóru væl umtóktir í alivinnuni, og tí hevur KJ valt at kalla tvíkiljurnar Hydro-Cat*

*Mynd: Sofus Gregersen*

### Samráðingar

- Umframt hesar fýra tvíkiljurnar, sum vit nú hava smíða og skulu smíða til alivinnuna í Føroyum, eru samráðingar í gongd um aðrar slíkar bátar. Vit vænta tískil ikki, at hesir fýra alibátarnir verða teir seinastu í røðini, sigur marknaðarleiðarin, sum er sera fegin um, at alivinnan í Føroyum hevur tikið so væl ímóti hesum bátunum.

Nýggi bátarnir verða 15 metrar langir, seks metrar breiðir, og maskinorkan verður nakað størri.



- Jú, hetta sær ógvuliga spennandi út, ásannar Sofus Gregersen.

KJ og teir, sum eiga smiðjuna á Skarðhamri á Borðoyarvík, hava samstarvað í fleiri ár, og nú hava hesi feløgini saman við Heðini Poulsen stovnað nýtt felag,

# Fleiri bein at standa á í skipavinnuni

**- Eitt av endamálunum hjá okkum við keypinum av Sandfelli er at hava fleiri bein at standa á í skipavinnuni, sigur Andrass Jóanesarson, reiðari**

SKIPAVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í Sosialinum í gjár høvdu vit samrøðu við Andrass Jóanesarson, sum saman við brøðrum sínum og pápanum, Páll Jóanesarson, hava keypt farmaskipið, Sandfelli úr Noregi.

Frammanundan eiga faðir og synir línubátarnar, Margit, sum er fyrrverandi Hvítabjørn og Sjóstjørnuna, sum er fyrrverandi Bárðadrangur.

- Eitt av endamálunum hjá okkum við keypinum av Sandfelli er at hava fleiri bein at standa á, sigur Andrass Jóanesarson.

Tað er felagið P/F Run, sum eigur Sandfelli, og aftanfyri felagið stendur móðurfelagið, Sp/F Lón í Saltangará.

Skipari við Sandfelli verður Martin Jóanesarson, sum er tvíburðabróðir, Edvard, ið er við Margit.

Enn vita teir ikki heilt, hvussu nógv tað fer at krevja av eigarunum at reka skipið, men í fyrstu syfti verður Andrass uppi á landi og tekur sær av tí dagliga.

Hann er eisini stjóri í felagnum, sum eigur farmaskipið.

Tað er eitt norskt shippingfelag, sum syrgir fyri farminum hjá Sandfelli, og tað var eisini hetta felag, sum tók sær av hesum fyri eigaraskiftið.

Sandfelli kemur serliga at sigla millum norskar havnir, men fyrstu tvær lastirnar hevur skipið fingið úr Føroyum. Hetta er fiskamjøl, sum skipið skal føra yvir á Stavanger-




leiðina.

Annars væntar reiðarin, at siglingin mest verður í Norðsjónum og Eystursjónum.

- Sandfelli er eitt fleksibult skip, og vit hava góðar vónir um, at hetta fer at bera til, sigur Andrass Jóanesarson, stjóri og reiðari.